## Absalon sýnir málningar

Framsýning: Absalon Absalonsen hevur hesa vikuna málningaframsýning í Vági. Sýningin er í handilshølunum, har Elektronikkbúðin helt til, beint yvir av Suðuroyar Sparikassa. Absalon hevur arbeitt á sjónum, men er eisini kendur sum høvundur og hann hevur skrivað nakrar bøkur, bæði skaldsligar og siðsøguligar. Men nú sýnir hann, at hann eisini er kringur við penslinum. Líka síðani barnaárini hevur hann fingist við at tekna og mála, men nú hann er pensjóneraður, er tíðin betri til frítíðarítrivið. Myndevnini eru mest náttúra og skip, og evnini eru annars bæði í Suðuroynni og norðanfyri. Dagfinn Olsen



*Absalon Absalonsen hevur í hesum døgum málningaframsýning í Vági*
(Mynd: D. Olsen)

# Beta-skipini í skýming og




*Heykur leggur til bryggju í Saltangará. Nógv fólk eru og taka ímóti. Nýggju skipini hjá Faroe Seafood kosta stívliga 40 miljónir krónur hvørt*
Mynd: Vilmund Jacobsen

**Hóast tað var farið at skýma og regnaði illa, vóru nógv fólk til hátíðarhaldið í gjár, tá ið nýggju ísfiskatrolararnir hjá Faroe Seafood fyrstu ferð løgdu til bryggju í Saltangará**

NÝBYGNINGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Faroe Seafood og Runavíkar kommuna gjørdu nógv burtur úr, tá ið nýbygningarnir úr Vigo í Spaniu komu til landið seinnapartin í gjár.

At Faroe Seafood rættiliga ynskti at "markera" dagin, sást, tí øll skip og manningar, sum felagið hevur undir sínum hatti í dag, vóru partur av hátíðarhaldinum og móttøkuni.

Við nýggju skipunum á odda inneftir Skálafjørðinum fylgdi allur flotin hjá felagnum Heyki og Falki til bryggju.

Í skýming og oysandi regni var tað Heykur, sum fyrstur legði til bryggju og fekk endarnar fastar. Næstur honum var hin nýbygningurin Falkur, og síðan løgdu øll hini skipini til bryggju.

Hornorkestur spældi, og tveir sangir vórðu býttir út og sungnir, "Boðar tú til allar tjóðir" – og "Tú alfagra land".



*Millum tey mongu, sum tóku lut í hátíðarhaldinum, var Olaf Olsen, fyrrverandi reiðari hjá P/F Beta gjøgnum mong ár*
Mynd: Vilmund Jacobsen

### Endurgav Poul F

Fyrstur á pallin var borgarstjórin í Runavíkar kommunu, Hans Jacob Lamhauge.

Hann ynskti Faroe Seafood hjartaliga tillukku við teimum fýra stásiligu skipunum, sum felagið í ár hevur fingið til landið, Róki, Lerki – og nú Heyki og Falki.

Borgarstjórin heilsaði eisini øllum manningunum og segði seg vóna, at eydnan kemur at fylgja teimum.

– Tað er ikki á hvørjum sinni, at fýra so snotulig skip koma á sama pláss.

Hans Jacob Lamhauge endurgav skaldið, Poul F. Joensen, sum í eini av yrkingum sínum sigur:

*"Borin eru vit í heim*
*mitt í Atlands sjó.*
*Brim og hvøllir stormar*
*vóru*
*ofta vøgguljóð".*

### Orðini til okkara

– Vit, sum búgva við Skálafjørðin, kunnu gera skaldsins orð til okkara. Nógv skip hava stevnt inneftir fjørðinum gjøgnum tíðirnar, Lizzy, Galatea, Lítla Emma, Minnie, Oknin – og síðan allir trolararnir, sum hava havt sítt pláss her.

Í røðuni nevndi hann eitt nú Símun á Høgabóli, Jákup Andrias í Kálvhúsinum, Napolin Jacobsen, Olaf Olsen, Højgaards Handilsvirki, Snaraløk, Beta og fleiri.

– Hesi skip, útgerðarfeløg, manningar og skiparar siga øll somu søgu – søguna um áræði, dirvi, sjálvbjargni og álit á, at bert tann eini kann signa verkið. Góðynskir um veiði og hepni hava fylgt hvørjum skipi, og menn hava havt visjónina um at vinna sær og sínum livibreyð, inntøkur og betri livikor.

Borgarstjórin segði, at hesir løgdu lunnar undir ta vælferð og tað framkomna